# Víkingur snávaði

**FÓTBÓLTUR** Víkingarnir vóru ikki nøgdir við bara at fáa eitt stig í Sarpugerði, tá uppflytararnir úr Vágum vitjaðu um vikuskiftið

Uni Holm Johannesen

| | |
|---|---|
| Víkingur | 1 |
| 07 Vestur | 1 |

Hýrurin var góður á vágamonnunum. Tað var hann sjálvandi ikki á heimaliðnum. At fáa eitt stig á heimavølli móti einum uppflytara, sum hevði fingið eitt stig í fyrstu fýra landskappingardystinum, er sjálvsagt ikki nøktandi, tá tú ætlar at stríðast um føroyameistaraheitið.

Víkingur fekk ongantíð fer á sítt spæl. Heimaliðið var nógv meira á bóltinum, men verjuparturin hjá 07 Vestur var væl skipaður og tók sær av tí, sum var.

## Símin fyri fyrstu ferð

Símin Hansen skeyt sítt fyrsta mál fyri Víkingi, tá fáir minuttir vóru spældir. Hann fekk bóltin á brotsteigarmarkinum, og við góðum skoti legði hann heimaliðið á odda.

Tað tóktist ikki darva vágamonnunum meira enn so, at teir framhaldandi treiskaðust eftir bóltinum. Tað gav úrslit, tá Tór-Ingar Akselsen javnaði. Hann royndi seg við skoti, sum umvegis ein mótstøðuspælara, fór í netið handan Geza Turi. Tá var fyrra umfarið hálvrunnið.

Eftir steðgin syrgdu gestirnir fyri, at Víkingur ikki slapp til stórvegis møguleikar. Heimaliðið var á bóltinum fyri tað mesta, men tað var sjáldan, at Hans Jørgensen, sum vardi málið hjá 07 Vestur, fekk seg royndan av álvara.



*Víkingur røkti ikki sína skyldu sum kandidatur til føroyameistaraheitið. Uppflytarin 07 Vestur fekk eitt stig í Sarpugerði*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Atli Gregersen varð útvístur, tá fáir minuttir restaðu í. Hann sló frá sær og varð sektaður við reyðum korti.

## Fjórðingsfinalurnar eru næst

Næsta uppgávan hjá bæði Víkingi og 07 Vestur er fjórðingsfinalan í kappingini um løgmanssteypið. Dystirnir verða avgreiddir mikudagin. Tá er upplagdur møguleiki hjá Víkingi at fáa uppreisn. Tá vitjar B68 í Sarpugerði.

07 Vestur fær vitjan av KÍ.

# Málini rapla inn

**FÓTBÓLTUR** 23 ferðir er Símun Rógvi Hansen, málverji hjá B71, farin í meskarnar eftir bóltinum, tí mótstøðuliðini hava fingið mál. Sandoyingar hava púrt einki prógvað í landskappingini higartil

Uni Holm Johannesen

| | |
|---|---|
| B71 | 0 |
| B68 | 5 |

– Tað sigur seg sjálvt, at tað er strævið. Tað eru næstan eingir glottar at hóma í spælinum ella úrslitunum, og tað er ikki ofta, vit kunnu taka okkurt stimbrandi við okkum. Tað er tungt.

Ebbe Kristin Thomsen, B71, harmast um støðuna. Sandoyingar eru bukaðir bláir og gulir higartil. Null stig og 23 mál farin ígjøgnum eftir fimm dystum. Seinastu tveir heimadystirnir tala sítt greiða mál. Víkingur vann 6-0, og B68 vann 5-0.

Tað er helst ikki at taka ov rívan til at siga, at B71 fer at fáa tað sera trupult í bestu deildini næstu mánaðirnar.

– Tað er lítið fólk at taka av. Tijani Mohammed spældi við skaða í dag, og eg havi verið sjúkur seinastu dagarnar. Vit hava tørv á fleiri fólki, tíverri, sigur Ebbe Kristin Thomsen.

## Tað verður tungt

Bill M. Jacobsen og B68 vunnu fyrsta sigurin í hesum kappingarárinum um vikuskiftið. Hann sigur, at B71 hevði tvær upplagdar møguleikar at fáa mál beinanvegin. Toftamenn fingu brádliga leiðslumálið. Venjarin hjá B68 heldur, at keðiliga gongdin hjá sandoyingum merktist.

– Støðan hevði verið ein onnur, um teir løgdu seg á odda. Teir hava tapt við nógvum málum fyrstu vikurnar, og sinnisliga hevur tað stóra ávirkan. Mótbrekkan var teimum tung beinanvegin, heldur Bill M. Jacobsen.

Jónleif Højgaard, Ibrahima Camara, sum skeyt tvey mál, Niclas Fríðrikur Joensen og Stig-Roar Søbstad komu á máltalvuna fyri B68.

## Finnbogason útvístur

Helgi Annel Finnbogason var útvístur í fyrsta umfarinum, tá sandoyingar spældu móti KÍ. Hann fekk aftur reyða kort hesaferð. Íslendingurin var feldur, tá hann var knappur aftur á fótum og hevndi seg.

Ebbe Kristin Thomsen hevur greiða støðu.

– Tað var reytt kort. Hann rendi høvdið eftir mótstøðuspælaranum, og tað er reytt kort. Vit vóru aftan fyri við tveimum málum tá. Eftir steðgin ræður bara um at avmarka tapið sum frægast, sigur Ebbe Kristin Thomsen.

Bill M. Jacobsen heldur ikki, at útvísingin hevði stóra ávirkan.

– Vit vóru greitt omaná. Tað verður sjálvsagt tyngri fyri teir, men vit høvdu fult tamarhald á dystinum, sigur hann.

## Líkist kreppu

Tað minnir ikki sørt um eina kreppu á Sandoynni í dag. Liðið hevur als ikki staðið kurl við hini liðini í Vodafonedeildini higartil. Úrslitini fekk heimasíðuskrivaran hjá B71 at taka blaðið frá munninum síðsta vikuskiftið.

– B71-spælararnir sóu ógvsuliga uppgevandi út. Hetta gongur ikki, tá man spælir við B71! Skal man spæla við B71, verður man noyddur at ofra seg 100 prosent. Um allir spælararnir ikki gera alt, hvat teir kunnu fyri at hjálpa hvørjum øðrum, so ber tað slett ikki til, skrivar heimasíðan.

Tað vita, hvør trupulleikin er. Stríðshugurin, sum bar langt síðsta kappingarár, skal finnast fram aftur alt fyri eitt. Spurningurin er, hvussu Piotr Krakowski, sum hevur evstu ábyrgdina av liðnum, fær tað í lag.

## 11 mánaðir síðani seinast

Stig-Roar Søbstad skeyt umsíðir sítt fyrsta mál fyri B68, tá toftamenn vunnu stórsigur á sandoyingum. Tað er fyrsta málið hjá norska framherjanum í føroysku landskappingini síðani tann 29. mai í fjør. Tá stóð hann fyri málinum hjá argjamonnum, tá AB og Víkingur spældi 1-1.

– Tað er umráðandi, at hann fær hol á málskjótingina, sigur Bill M. Jacobsen, venjari.

Stig-Roar Søbstad kom til Føroya á sumri í 2009. AB, sum hevði vunnið sær pláss í miðbólkinum á stigatalvuni, skrivaði á sínari heimasíðu, at liðið hevði fingið nýtt krút úr Noregi. Søbstad, sum hevur eina fortíð í Molde, skeyt nógv mál fyri Korsvoll í næstbestu deildini í Noregi. 11 mál í 27 dystum fyri argjamenn vóru eisini nøktandi hagtøl, tá hann skifti til B36 í summar. 28 ára gamli framherjin skeyt einki mál fyri B36.

– Eg eri framherji, og eg ætli mær at skjóta mál á Toftum. Vónandi eigi eg ein leiklut í, at vit fara at standa okkum væl, segði Stig-Roar Søbstad við Sosialin tann 8. desember í fjør.

*uni@sosialurin.fo*